# Talvan varð vaskað

**Yvir høvur var avrikið hjá landsliðsleikarum okkara gott í Beograd. Skal nakar takast burtur úr rúgvuni, má tað vera Jákup Mikkelsen, sum hevði eina bjarging í avgjørdum heimsflokki, og sum yvir høvur stóð ein branddyst. Annars eyðkendi sannur stríðsvilji avrikið hjá liðnum, sum eisini vaskaði stórtapið á heimavølli av sær**

LEIKARAUMMÆLI
*Jákup Mørk*



*Yvirhøvur stóðu allir leikararnir á føroyska liðnum seg væl, og tað eydnaðist teimum eisini at fáa uppreisn eftir dygga stórtapið á Tórsvølli fyri tveimum mánaðum síðani*

*Mynd: Aleksander Djorovic*

### 1. Jákup Mikkelsen, Molde
*22 dystir/0 mál*

Hóast tað ikki var so ótrúliga nógv at gera hjá Jákupi, so vórðu tær royndirnar, sum komu móti máli hansar sera naskar. Hevði tíðliga í dystinum eina sera týdningarmikla bjarging, tá Milosevic royndi seg úr spískum. Seinni hevði hann eisini tvær sera góðar paradur, áðrenn hann við einari bjarging í heimsflokki vardi fyri stútaranum frá 18.

Málini bæði fekk hann púrt einki gjørt við, og einasta veruliga mistakið, sum hann framdi, gjørdi hann sjálvur gott aftur, tá hann sera rutinerað - men kanska ikki heilt reint - blokeraði rennibanan hjá Milosevicd. Var annars tryggur við innleggum, har hann aloftast valdi røttu loysnina, og í spælinum á jørðini vóru sum vant ongar atfinningar.

Saman um tikið er lítið at ivast í, at Jákup var stinnasti føroyski leikarin í dystinum, tó at avrikið hjá hinum á ongan hátt skal forsmáast.

### 2. Óli Johannesen, Hvidovre
*52/1*

Var eftir liðugt leikbann náttúrligt afturval á sweeparaplássinum, og sum vanligt treivst hann eisini sera væl á hesum. Rangstøðufellan riggaði aloftast væl, men serliga í fyrra hálvleiki hevði hann trupulleikar við at bakka upp í borðunum, har vongverjarnir fleiri ferðir vórðu yvirspældir. Hetta batnaði tó stórliga í seinna hálvleiki, har liðið yvir høvur fekk betri fatur á.

Óli fekk tó gult kort fyri at steðga Kezman, men hetta taldist millum tey meira neyðugu kortini.

### 3. Jens Kristian Hansen, B36
*38/2*

Eftir ein steðg í landsliðshøpi var fyrrverandi liðskiparin við aftur í hópinum, og sum væntað, gjørdist talan um eitt beinleiðis lop inn á vøllin. Avrikið hjá Jens Kristiani prógvaði eisini, at hann eigur at vera sjálvsagdur til eitt pláss á liðnum.

Hóast hann ikki var á vanliga plássinum sum miðverjuleikari, so er bóltførleikin somikið góður, at hann ikki hevði stórvegis trupulleikar av at spæla á miðvøllinum. Taktiska medvitinum bilar heldur einki, og uttan at hann á nakran hátt gjørdi nakað stórvegis hóvasták, so rúgvaði hann væl upp á vøllinum.

### 4. Johan Byrial Hansen, OB
*5/0*

Grundað á avrikini í landsdystum sínum í vár, fekk Johan aftur møguleikan, hóast mong høvdu gitt, at Jens Kristian kanska fór at taka plássið aftur.

Veruleikin er tó, at Johan Byrial ongan tíð hevur spælt seg av liðnum, og tað gjørdi hann so avgjørt heldur ikki hesaferð. Var sera stinnur í verjupartinum. Bæði við høvdinum og beinunum, og átti so avgjørt sín triðing í góða verjuavrikinum. Í framrættaða spælinum er tó ofta líkt til, at hann er ov bangin fyri at gera mistøk, men ivaleyst er hetta nakað, sum fer at batna við fleiri altjóða royndum.

### 5. Hans Fróði Hansen, B68
*20/1*

Tað er eftir hondini við at vera langt síðani, at Hans Fróði hevur spælt nakran ringan dyst fyri landsliðið. Var sum vanligt einaráðandi í luftini, og tá hann stútar burtur, er talan ikki bara um eitt nikk út um brotsteigin, men langt niðan og út í síðurnar. Stóð seg eisini væl niðri á jørðini, og hevði enn tá sjálvsálit til at koma niðan á vøllin, har hann stóð fyri tveimum føroyskum skotroyndum.

### 6. Øssur Hansen, B68
*46/2*

Hevði eins og felagin í høgru síðu trupulleikar av skjótu jugoslavisku vongspælarunum í fyrra hálvleiki, tá hann fleiri ferðir varð yvirspældur í djúpdini. Hetta batnaði tó nógv í seinna hálvleiki, tá føroyska liðið tóktist betri skipað.

Frameftir vøllinum var Øssur ikki heilt so sjónligur, sum hann vanliga er á landsliðnum, men ivaleyst komst hetta eisini av taktiskum bindingum. Fekk fram móti dystarenda gult kort fyri eina alt ov seina takling, og sleppur tí ikki at vera partur av dystinum móti Luksemburg, men verður ivaleyst at síggja aftur fýra dagar seinni.

### 7. Fróði Benjaminsen, B68
*12/0*

Hevði serstakliga í byrjanini stórar trupulleikar, og eftir skjóta gula kortið var veruligur vandi fyri einum reyðum, tá hann framhaldandi gjørdi fleiri minni fríspørk.

Spældi seg tó sera væl upp, og bendir hetta so avgjørt á stóra sálarliga styrki. Ein styrki, sum eisini kemur til sjóndar í spælinum fram eftir vøllinum, har Fróði telist millum teirra, sum tora at bjóða seg til, umframt at hann eisini er nóg kaldur til at taka ferðina av spælinum, hóast nógv stendur á.

### 8. Julian Johnsson, Hull City
*41/1*

Orðini eru helst við at verða heldur slitin, men tað er ófatuligt, hvussu nógva orku Julian hevur. Var so at siga alla tíðina í sentrum av hendingunum á vøllinum. Hann vann hópatals bóltar við høvdunum og longu beinunum, og ikki minst kom hetta til góðar frameftir vøllinum. Gaman í var talan ikki um tey nógvu føroysku álopini, men Julian var partur av teimum flestu, og eisini hjálpti tað føroyingum at fáa luft, tá hann í nógvum førum fekk longt langar bóltar við høvdinum.

### 9. Jákup á Borg, B36
*15/0*

Var aftur á høgra vongbakki, sum hann at kalla hevur ognartikið, og sum heild má avrikið eisini sigast at vera nøktandi. Hevði tó stórar trupulleikar í fyrra hálvleki, tá jugoslavar fleiri ferðir komu ígjøgnum hansara síðu, men tað hoyrir eisini við til ta søguna, at Jákup hesi trý korterini var rættiliga einsamallur.

Í seinna hálvleiki fekk hann nógv betri hjálp í so máta, og umframt at styrkja verjupartin opnaði hetta eisini fyri møguleika at koma fram eftir vøllinum, har hann fleiri ferðir var partur av samanspæli við serliga Julian Johnsson.

### 10. John Petersen, B36
*34/3*

Var framrættaði maðurin á føroyska miðvøllinum, og sýndi enn einaferð, at hetta er plássið, sum hann trívist best á á landsliðnum. Var óræddur at bjóða mótstøðumonnum av, og í fleiri førum eydnaðist eisini at halda somikið væl upp á bóltin, at samanspæl við viðleikarar spurdist burturúr.

Varð tikin út seinastu løtuna, men hetta mundi meira vera av møði enn misnøgd frá Allani Simonsen, tí John sýndi enn eina ferð, at hann er ein hin týdningarmesti liðurin á landsliðnum.

### 11. Chistian Høgni Jacobsen, NSÍ
*6/1*

Varð tikin fram um Kurt Mørkøre, tá Allan Simonsen skuldi sálda annan áleyparan frá, og í høvuðsheitum má sigast, at talan varð um eina sera ótakksama uppgávu. Royndi tó tað hann var mentur at órógva jugoslavisku verjuna, men viðhvørt hevði verið ynskiligt, at hann var eitt sindur dólskari í so máta, tí arbeiðshugur hansara førdi hann í fleiri førum aftur í egnan brotsteig. Fekk ta einu ferðina roynt seg móti jugoslaviska málinum, men tíverri fór tann royndin omanfyri.

Kann tó á ongan hátt sigast at hava spælt seg av liðnum, tí arbeiðsumstøður hansara vóru somikið torførar, at metingargrundarlagið gerst ógvuliga tunt.

### 12. Súni Olsen, FC Zwolle
*3/0*

Lítla løtan á vøllinum kann ikki nýtast sum veruligt metingargrundarlag, men fáu minuttirnir fara kortini at verða leingi í minninum. Súni fekk nevnliga ein risa møguleika, tá Kurt spældi hann leysan av miðvøllinum, men tíverri las jugoslaviski málverjin, hvørjar ætlanir gøtumaðurin hevði, og so spurdist einki burturúr.

### 13. Kurt Mørkøre, KÍ
*35/3*

Fekk seinasta hálva tíman á vøllinum fyri Christian Høgna, og hóast avmarkaða tíð, so prógvaði Kurt veruliga, at hann framvegis hevur nakað at geva landsliðnum. Føroyska liðið hevði eisini sína bestu løtu hendan hálvan tíman, og partvíst hekk tað saman við innskiftanini av Kurt. Fram um Christian Høgna dugir Kurt betri at vera veruligur áleypari. Hann megnaði at halda bóltinum, og so hevur hann eisini kropsligu styrkina at slíta seg leysan. Var tvær ferðir um reppið at sleppa frá verjuni við bóltinum, og átti eisini frísspælingina til Súna Olsen, sum átti at givið mál.

### 17. Rógvi Jacobsen, HB
*11/0*

Eins og hjá Súna vóru minuttirnir á vøllinum alt ov fáir til, at ein verulig metan av avrikinum kann fara fram.

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 17. august til hósdagin 23. august**

## Hvat nú?

**ÚF Mánadagin kl. 17.05**

Í sendingini verður sum spældur góður norðurlendskur dansitónleikur.

Prátað verður eisini við Gunnar Fjeldseth, ið við sínum dansiorkestri gjørdist vinnari í kappingini ársins dansilag í Noregi í ár. Elis hitti Gunnar Fjeldseth, tá fyrsti dansibandfestivalurin varð hildin í juli mánaði í ár.

## Exodus
*– am. krígsdrama frá 1960 við Paul Newman*

**SVF Fríggjakvøldið kl. 21.25**

Farmaskipið Exodus brýtur í 1947 bretska stongsulin, fyri at seta kós móti Haifa. Umborð eru Ari Ben Canaan og 610 aðrir jødar, sum vilja seta á stovn statin Ísrael, men fíggindarnir uttanfyri, bretarnir og arabararnir, eru ikki tær einastu forðingarnar. Tað er eisini ósemja um, hvussu arbeiðið skal fara fram, og hin hóvligi Ari fær harða mótstøðu bæði frá Dov, sum fegin vil stríðast, og frá sínum egna pápabeiggja.

*Leikarar: Paul Newman, Eva Marie Saint, Ralph Richardson o.o*

*Leikrit: Dalton Trumbo eftir kendu skaldsøguni hjá Leon Uris.*

*Leikstjórn: Otto Preminger*

*Filmurin er óhósk. fyri smábørn*

## Kærleikans offur
*– bretskt drama frá 1996*

**SVF Leygarkvøldið kl. 21.00**

Martyn Wyatt (Martin Donovan) er vorðin sannførdur um, aftaná at hava verið giftur í fleiri ár, at hann er samkyndur. Hann verður skildur frá Honnu (Joely Richardson), sum fær foreldramyndugleikan yvir sonin Oliver. Tað gongur tó ikki long tíð, áðrenn drongurin kemur til pápan og nýggja vin hansara Tom ( Ian Hart), illa meiðslaður. Martyn gerst skjótt greiður yvir, at tað er nýggi sambúgvin hjá Honnu, sum hevur bukað hann. Martyn fer nú undir eitt langt stríð gjøgnum rættarskipanina, fyri at fáa loyvi til at geva soninum ein tryggan barndóm.

*Leikarar: Martin Donovan, Sam Bould, Joely Richardsson o.o.*

*Leikrit: Neville Bolt og Paula Milne*

*Leikstjórn: Angela Pope*

## Delfinmaðurin
*– fronsk dokumentarsending frá 1999*

**SVF Sunnudagin kl. 15.10**

Italiumaðurin Umberto Pellizari er raskasti kavari í heiminum. Ein løgin maður innan hetta ítrivið. Pellizari kann halda andanum í meira enn sjey minuttir, tá hann kavar, og hann hevur verið hálaður niður á 150 metra dýpi.

## 2. veraldarbardagi í litum 1:3
*– ensk dokumentarrøð*

**SVF Sunnudagin kl. 16.10**

2.heimsbardagi hevur higartil vístur í hvørt/hvítum myndum, men nú hevur tað eydnast at finna upptøkur, sum vara í fleiri 100 tímar frá hesum árunum, sum eru filmaðar í litum. Við myndunum verða endurgivin brot úr brøvum og dagbókum. Seinast í 30'unum er nazistisk floksstevna í Týsklandi, borgarakríggið herjar í Spania, bretarnir hátíðarhalda krúningina av George VI og USA er við koma burturúr teim ringastu árunum.

## Læknin hevur orðið

**SVF Mánakvøldið kl. 20.45**

Læknin Peter Qvortrup og manning hansara eru nú komin aftur úr summarfrí, og komandi mánakvøld er hann aftur á skíggjanum, har hann svarar spurningum frá hyggjarum, og tekur upp viðkomandi evni innan heilsuøkið.

## Fríggjadagur 17. august

**SVF**

18.30 Likkulikkuleia 12
19.00 Trý á ferð 10:13
19.25 Hokus Krokus – donsk urtagarðssending
20.00 Dagur og Vika
20.20 Í apubúrinum – ensk djórasending
20.45 Gekkur
21.25 Exodus – am. krígsdrama frá 1960, óhósk. fyri smáb.
00.45 Liðugt

**Eurosport.com**

07:30 Football: Road To World Cup 2002
08:30 Truck Sports: Fia European Truck Racing Cup In Alastaro, Finland
09:00 Tennis: Wta Tournament In Toronto, Ontario, Usa
10:30 Golf: Us Pga Tour - Buick Open In Grand Blanc, Michigan, Usa
11:30 Motorsports: Series
12:00 Car Racing: Automagazine
12:30 Boxing: From The Miccosukee Resort And Gaming In Miami, Usa
13:30 Football: Road To World Cup 2002
14:30 Tennis: Wta Tournament In Toronto, Ontario, Usa
16:00 Tennis (Live): Wta Tournament In Toronto, Ontario, Usa
18:00 News: Eurosportnews Flash
18:15 Tennis (Live): Wta Tournament In Toronto, Ontario, Usa
21:00 Dancing: World Masters Latin Professionals In Innsbruck, Austria
22:00 News: Eurosportnews Report
22:15 Adventure: Adnatura
23:15 Xtreme Sports: Yoz Mag
23:45 Xtreme Sports: Yoz Action
00:15 News: Eurosportnews Report
00:30 Close

**BBC Prime**

0.00 TLZ: »Great Writers of the 20th Century«
1.00 TLZ: »Qed - Bionic Woman«
1.30 TLZ: »Q.E.D. Clockwork Radio«
2.00 TLZ: »Picturing the Modern City«
2.25 TLZ: »Mind Bites«
2.30 TLZ: »Making the News«
3.00 TLZ: »The Rinuccini Chapel Florence«
3.25 TLZ: »Mind Bites«
3.30 TLZ: »Synthesis of A Drug«
3.55 TLZ: »Mind Bites«
4.00 TLZ: »Trouble at the Top«
4.40 TLZ: »Landmarks – Timelines«
5.00 TLZ: »French Fix – Clothes and Shopping«
5.30 TLZ: »English Zone«
6.00 Radio Roo
6.15 Playdays
6.35 Run the Risk
7.00 Incredible Games
7.30 Celebrity Ready Steady Cook: »Emma Boundy & Shane Richie«
8.00 Style Challenge: »Cruising«
8.25 Change That: »Bedford«
8.50 Bargain Hunt
9.15 Antiques Roadshow
10.00 Wildlife: »Wild Boar:King of the Wildwood«
10.30 TLZ: »Horizon – Silent Children, New Language«
11.30 Fantasy Rooms: »Ritz«
12.00 Celebrity Ready Steady Cook
12.30 Style Challenge: »European Show«
13.00 Doctors
13.30 Eastenders
14.00 Change That: »Liverpool«
14.30 Bargain Hunt
15.00 Radio Roo
15.15 Playdays
15.35 Run the Risk
16.00 Incredible Games
16.30 Top of the Pops 2
17.00 Gardeners' World
17.30 Doctors
18.00 Eastenders
18.30 Escape to the Sun
19.00 One Foot in the Grave: »The Valley of Fear«
19.30 The Brittas Empire
20.00 The Tenant of Wildfell Hall
21.00 All Rise for Julian Clary
21.30 Later with Jools Holland
22.30 From Russia with Spreadlove
23.00 French & Saunders
23.30 Game on

**BBC World**

0:00 BBC News
0:30 HARDtalk (r)
1:00 BBC News
1:30 Talking Movies (r)
2:00 BBC News
2:30 Simpson's World
3:00 BBC News
3:30 Asia Today (r)
3:45 World Business Report (r)
4:00 BBC News
4:30 HARDtalk (r)
5:00 BBC News
5:30 Click Online (r)
6:00 BBC News
6:30 Simpson's World
7:00 BBC News
7:30 HARDtalk
8:00 BBC News
8:30 Top Gear (r)
9:00 BBC News
9:30 Life (r)
10:00 BBC News
10:30 HARDtalk (r)
11:00 BBC News
11:30 Talking Movies (r)
12:00 BBC News
12:30 Life (r)
13:00 BBC News
13:30 HARDtalk (r)
14:00 BBC News
14:15 World Business Report
14:30 Talking Movies (r)
15:00 BBC News
15:30 Life (r)
16:00 BBC News
16:30 Asia Today
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Top Gear (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 QED
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 World Business Report Special: A Game Of Two Halves
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

**TV3**

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:00 TV-shop
08:00 Herkules - de unge år
08:25 Ricki Lake (G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen (G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Caroline, karrieren og kærligheden
12:20 Panter-tanter
12:50 Vild med dig
13:20 Pæn pige - sej sild
13:45 Interne affærer
14:40 Caroline, karrieren og kærligheden
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch Hawaii
16:35 Ricki Lake
17:30 Med på moden
18:00 Alle tiders barnepige
18:30 Bette
19:00 Sjov og Spas
19:30 Sjov og Spas
20:00 Faktor 21 Film: Spionerne der elskede mig
21:45 Smuglerpiloten
23:35 Sex & the City
00:05 Lægerne
01:05 Skydeskæg på larvefødder
03:15 Sunset Beach
04.05 Sunset Beach (G)
04:55 Godnat

**ÚF**

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur Sylverius Jacobsen á Skála lesur.
07.15 Morguntónleikur
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar Bjørg Brend og Kári Olsen leggja til rættis
08.00 Tíðindi
08.05 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Login í hellinum undir kaffistovuni (e) Egi Dam lesur stuttsøgu eftir Meinhardt Jensen. Stuttsøgan er úr stuttsøgukappingini hjá Listastevnu Føroya.
09.28 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) Sylverius Jacobsen á Skála lesur.
10.05 Fimleikaløtan - vika 2
10.10 Máltráðurin
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) Gunnvør Poulsen leggur til rættis.
11.33 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.03 Middagstónleikur
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Í víngarðinum (e)
15.00 Tíðindi
15.03 Rót og rútma (e) Petur Rouch velur country tónleik
16.00 Tíðindi
16.03 Zenith Helena Debes Hentze og Høgni í Jákupsstovu skipa fyri.
17.00 Tíðindi
17.04 Í víngarðinum
17.05 Vikuskiftið Helena Debes Højgaard og Høgni í Jákupsstovu leggja til rættis.
18.00 Norðurlendskur tónleikur Kim Hansen leggur til rættis.
18.25 Skráin og lýsingar
18.50 Tónleikur
19.00 Apollo 13 Fríggjakvøldssending hjá Kára Sólstein og Fróða Løkságarð.
20.00 Estudio 2000 Kári Annand Berg leggur til rættis.
21.00 Fimleikaløtan - vika 2 (e)
21.05 Dagsetur Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Tíðindi

**Rás 2**

09:45 Orðið Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Go'morin Skráin, veðrið, aktuelt, dagsins mál, prát við lurtarar og tónleikur. Ó.J.Rólantsson er vertur. Telefonin svarar á 359993.
12:00 Tíðindi
12:10 Lættur tónleikur
13:00 Ynskiløtan Heilsur frá lurtarunum Laila Jacobsen er vertur. Send heilsur via (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
15:00 Tíðindi
15:10 Rák Georg Eystan Á og Conny Thomassen eru vertir. Ring 359993.
17:00 Lættur tónleikur
18:00 Tíðindi
18:15 Lættur tónleikur
21:00 Tíðindi
21:15 Orðið (e) Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Beatin v/ Eyðfinn Drewsen Tónleikasending fyri ung
22:30 Náttarsending Undirhaldssending úr Studio 7 í Klaksvík Gunnar Hansen og Kristian Joensen eru vertir
01:00 Liðugt

**Lindin**

13.00 Byrjan – Dagsskrá verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 "Lívgandi Orð" fyri hesa vikuna. v/ Tórður Poulsen
14.00 Brot og bitar (e)
14.30 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna. v/ Símun Absalonsen gestur Jógvan Zachariassen.
15.30 Blandaður tónleikur
17.00 Bønartænastan byrjar. Tlf. 321377, tilber at senda fax nr. 321379 Vit spæla lovsong tann næsta tíman.
17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.00 Bønartænastan. Biðji verður fyri bønarevnunum
20.00 Tónleikur fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð (e)
22.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
22.05 Horitzon Star v/ Stella Zachariassen (e)
23.05 Dagsskráin fyri leygardag verður lisin
23.10 Góður tónleikur fyri ung
04.00 Vit gevast